# *Aðalfundur*

# *hjá*

# *Kommunusamskipan Føroya*

# *2011*

Kommunusamskipan Føroya

# Innihaldsyvirlit

**Frágreiðing um virki felagsins í farna ári og um framtíðarætlanir...........3**

**Um Kommunusamskipan Føroya ..............................................................12**

**Umboð hjá Kommunusamskipan Føroya í nevndum, ráðum v.m............13**

**Hoyringar frá landstýrinum v.m.................................................................14**

**Viðtøkur fyri KSF.........................................................................................16**

# Frágreiðing um virki felagsins í farna ári og um framtíðarætlanir

**Inngangur**
Gott fundarfólk, eg skal bjóða tykkum hjartaliga vælkomin á aðalfund hjá Kommunusamskipan Føroya.

Eg skal í hesi fyrstu formansfrágreiðing mínari greiða frá virksemi felagsins í farna ári og framtíðarætlanum felagsins.

Politiska eins og fyrisitingarliga virksemið hjá KSF í 2010, og tað sum higartil er farið av 2011, hevur enn einaferð verið nógv merkt av teimum reformum, sum landsins stýri hevur havt ætlanir um at fremja, men sum nærum uttan undantak eru steðgaðir upp orsakað av politiskari ósemju.

Alt hetta valskeiðið hevur verið tosað um kommunal-, fólkaskúla- og pensjónsreform. Men ósemjan millum flokkarnar í sitandi samgongu hevur verið so mikið grundleggjandi, at tað hevur ikki eydnast at fremja nakran av hesum reformum. Samgonguflokkarnir hava loksins tikið avleiðingar av tí, og ABC-samgongan er farin í søguna. Hvørjar reformar, minnilutasamgongan millum sambandsflokkin og javnaðarflokkin fær stuðul til at fremja, tað sum eftir er av valskeiðinum, er í løtuni ivasamt.

Eg fari í formansfrágreiðingini at leggja størstan dentin á at umrøða nøkur av hesum stórmálum, og eg verði tí at lata nøkur av teimum smærru málunum, ið uppi hava verið í farna ári, fara aftur við borðinum. At umrøða hvørt einstakt mál verður ov drúgt. Eg vísi til yvirlitið yvir tey mál, ið hava verið til hoyringar hetta seinasta árið, sum er fylgiskjal til formansfrágreiðingina.

## Reformar og bygnaðarbroytingar

**Kommunureformurin**
Landsstýriskvinnan í kommunumálum setti í januar 2009 sokallaðu Kommunalu Umskipanarnevndina. Umskipanarnevndin varð mannað við embætisfólkum og serfrøðingum og hevði sum høvuðsuppgávu at

- koma við tilmælum um, hvørjar tær kommunalu eindirnar í framtíðini skuldu verða
- koma við tilmælum um, hvørji øki skuldu leggjast til kommunurnar
- koma við tilmæli um útreiðslubýtið

Í oktober sama ár varð álit handað landsstýriskvinnuni í kommunumálum, og KSF tók sum givið, at næsta stig í tilgongdini var, at umboð fyri land og kommunur settust við borðið sum javnbjóðis partar at viðgera politiskt, hvussu komast skuldi á mál við umskipanini av kommunala geiranum.

Dagsskráin hjá landsstýrinum var tó ein onnur. Í februar 2010 boðaði landsstýriskvinnan í kommunumálum frá, at nú skuldi setast ein politiskur fylgibólkur við umboðum fyri politisku flokkarnar og við avvarðandi landsstýrisfólkum. Fylgibólkurin skuldi finna semju um nýggjan kommunubygnað, nýtt ábyrgdarbýti millum land og kommunur og nýtt útreiðslubýti.

Kommunusamskipan Føroya fanst hvassliga at hesum ætlanum, ið vóru í stríð við allar tilráðingar í kommunuálitinum um umskipanartilgongdina, har serligur dentur var lagdur á javnbjóðis viðgerð og samskifti millum land og kommunur – politiskt eins og fyrisitingarliga. Eisini er hetta í stríð við samsvarandi tilgongdir, sum vit kenna úr grannalondum okkara, har kommunufeløgini hava verið sjálvsagdur partur í tilgongdini.

Atfinningarnar frá KSF vórðu tiknar til eftirtektar, og síðani hevur KSF lutvíst verið umboðað í politiska fylgibólkinum.

KSF hevur í allari tilgongdini - hóast kommunurnar ikki eru samdar í øllum lutum - sett sær fyri at viðgera øll uppskot, sum koma frá landsins síðu konstruktivt og positivt.

Fyrireikingarnar byrjaðu longu dagin eftir, at aðalorðaskifti um kommunalreformin hevði verið í løgtinginum. Hin 26. februar 2010 hittust umleið 60 kommunustýrislimir í limakommunum okkara á fundi í Klaksvík. Endamálið við fundinum var at viðgera uppskotið um kommunalreform á einum so breiðum og demokratiskum grundarlagi sum møguligt.

Fundurin kom til felags niðurstøðu og samtykti yvirlýsing, sonevnda Klaksvíksskjalið. Tað, sum kommunustýrislimir í limakommunum okkara samdust um, var:

- hvussu kommunali bygnaðurin skal skipast,
- hvørjar uppgávur skulu leggjast til kommunurnar, og
- hvussu tær skulu fíggjast.

Harumframt leggur yvirlýsingin stóran dent á, at lógarverkið í sambandi við, at eitt øki verður latið kommununum at umsita, virðir sjálvræðið og virkisfrælsið hjá kommununum og gevur rúm fyri, at kommunurnar kunnu laga loysnir til staðbundin viðurskifti.

Síðst, men ikki minst, legði yvirlýsingin alstóran dent á, at kommunalreformurin skuldi vera ein veruligur reformur, ein samlaður pakki, og ikki enda við einans at gerast ein spurningur um at leggja kommunur saman í størri eindir - og bert tað.

**Ein fólkslig tilgongd í samband við kommunalu umskipanina.**
Spurningurin, hvørt kommunur skulu leggja saman sjálvbodnar ella leggjast saman við lóg, hevur leingi staðið ósvaraður. Tvídráttur er báði á kommunupolitiskum og – serstakliga - á landspolitiskum stigi um hendan spurning. KSF hevur altíð ført fram, at kommunusamanlegging í fyrstu atløgu eigur at fara fram sjálvboðin. Hinvegin hevur KSF eisini ásannað, at verandi skipan við 30 kommunalum eindum, ið eru sera ymiskar í støðd og virkisføri, ikki er nøktandi, nú talan er um at yvirtaka stór málsøki

frá landinum. Í Klaksvíksskjalinum varð tí mælt til, at freist verður sett fyri, nær kommununurnar skulu hava skipað seg í burðardyggar og virkisførar eindir, ið eru førar fyri at yvirtaka slík mál, eitt nú fólkaskúla og eldraøki.

Í eini roynd at finna semju millum partarnar, sendi Innlendismálaráðið kommunufeløgunum uppskot um eina fólksliga tilgongd í sambandi við umskipanina av kommunala geiranum.

Sambært uppskotinum skuldi skipast fyri fólkaatkvøðu í øllum kommunum, og spurningurin sum setast skuldi, var, hvørt borgarin ynskti at leggja saman við teimum kommunum í økinum, sum eisini ynsktu samanlegging. Var svarið ja, skuldu kommununurnar leggja saman 1. januar 2013. Var svarið hinvegin nei, so var kommunan framhaldandi sjálvstøðug kommuna, men henni varð álagt at samstarva við aðrar kommunur, tá ið størri málsøki verða løgd kommununum at umsita.

KSF tók undir við uppskotinum um eina fólksliga tilgongd í sambandi við kommunureformin, tí felagið virðir sum grundsjónarmið, at rætt er at spyrja borgaran í kommununi, tá ið so týðandi broytingar skulu fremjast. Hinvegin er altavgerandi, at ein møgulig fólkaatkvøða er væl fyrireikað, og at hin einstaki veruliga veit, hvørjum hann atkvøður fyri, og hvørjar avleiðingar tað fær. Hesi viðurskifti vóru ikki viðgjørd í uppskoti landsstýrisins, sum bar brá av at vera ein síðsta roynd at finna semju millum ABC-flokkarnar.

Henda ætlan um fólkaatkvøður tykist ikki at hava havt stórvegis politiska undirtøku, og sera ivasamt er, um hesar ætlanir um fólkaatkvøðu nú gerast veruleiki.

**Uppskotið um útreiðslubýti í sambandi við yvirtøku av eldraøkinum**

Í landspolitisku skipanini hevur verið størri undirtøka fyri at lata kommununum eldraøkið at umsita, heldur enn fólkaskúlan. Tískil hava fyrireikingarnar higartil í stóran mun snúð seg um at greina útleggingina av eldraøkinum.

Í sambandi við møguliga útlegging av eldraøkinum er uppskot gjørt um útreiðslubýti. Fíggingin byggir fyrst og fremst á, at kommununurnar verða gjørdar skaðaleysar av teimum frádráttum, sum landið áleggur kommununum. Teir eru botnfrádráttur, fiskimannafrádráttur, farmaskipafrádráttur og uttanlandsfrádráttur. Harafturat skulu kommununurnar fáa inntøkumissin í sambandi við DIS og FAS-skipanirnar endurgoldnan.

Hetta skuldi sambært útrokningum givið kommununum uml. 320 mió. kr. í meirinntøku, sum svarar nøkulunda til tað, sum eldraøkið kostaði í 2010. Harumframt skulu leggjast framskrivingar á 80 mió. kr. svarandi til, hvat eldraøkið er mett at kosta í 2013.

KSF hevur sum heild tikið undir við, at ein møgulig útlegging av eldraøkinum verður fíggjað við, at frádráttir verða tiknir úr kommunalu skipanini og lagdir til landið at fíggja. Hetta er í samsvari við meginregluna um, at hann, ið valdar, eisini skal gjalda. Eisini er týdningarmikið at nevna, at tílíkur fíggingarháttur virkar útjavnandi, við tað at

øki, ið fáa stóran part av inntøkum sínum frá fiskivinnu, við hesum hátti fáa sama skattagrundarlag sum aðrar kommunur, ið hava aðra vinnusamanseting.

KSF hevur tó gjørt vart við, at nógv neyvari fíggjarligar útgreiningar mugu gerast av eldraøkinum. Eingin ivi man vera um, at eldraøkið verður ein hin største búskaparliga avbjóðingin í okkara samfelag í framtíðini. Tí mugu avtalur gerast millum land og kommunur um, hvussu vit møta teimum vandamálum, ið standast av broyttu aldurssamansetingini í samfelagnum komandi árini.

Eitt annað, sum hevur stóran týdning fyri útleggingina, er eldralógin, ið skal verða grundarlag undir eldraøkinum, tá ið tað í framtíðini verður kommunalt. Grundsjónarmiðið hjá KSF er, at talan eigur at verða um eina rammulóg, ið gevur kommununum rásarúm at finna staðbundnar loysnir, heldur enn eina lóg, sum skal stýra kommununum út í ytstu æsir, og sum kann gerast fyrisitingarliga stirvin og dýr at umsita.

Samumtikið er tó í løtuni ógreitt, hvussu verður við kommunureforminum. KSF sær ávísan vanda í, at ógreiðu parlamentarisku viðurskiftini í løtuni kunnu hava við sær, at okkurt ófullfíggjað uppskot fer ígjøgnum skipanina og verður samtykt. KSF vil gera alt til at forða fyri, at ein kommunureformur verður skundaður ígjøgnum fyri eitt møguligt løgtingsval í ótíð, bert tí reformurin skal prýða avrikslistan hjá onkrum landspolitikara.

**Pensjónsreformurin**

Ein annar týðandi reformur er pensjónsreformurin. Í løtuni liggur uppskot til viðgerðar í fíggjarnevnd løgtingsins.

Í KSF fegnast vit um, at loksins eru útlit til, at ein pensjónreformur verður samtyktur. Fyri kommunurnar er umráðandi, at allir borgarar eru fíggjarliga tryggjaðir á ellisárum, serliga nú sannlíkt er, at kommunurnar fáa alsamt størri ábyrgd av eldraøkinum annars.

Mest týðandi broytingin í pensjónsreforminum er, at frameftir verða allar pensjónsveitingar skattskyldugar. Tað er sokallaða bruttofiseringin av pensjónsveitingum.

Beinleiðis avleiðingin av uppskotinum verður, at landskassin fær eitt stórt hall, og kommunurnar fáa stórt yvirskot. Metta yvirskotið hjá kommunala geiranum er áleið 100 mió. kr. svarandi til uml. 1,25 skattaprosent.

Til tess at fíggjarliga nettoávirkanin á land og kommunur skal verða so lítil sum møguligt, er skotið upp at lækka kommunuskattin við 1,25 % og hækka landsskattin samsvarandi.

Fíggjarmálaráðið hevur sett fram ynski um at gera avtalu við hvørja einstaka av teimum 30 kommununum í Føroyum, soleiðis at í 2012 bindur hvør kommuna seg til at lækka skattin við 1,25 %, til tess at landið skal fáa rásarúm at hækka skattin samsvarandi. Úrslitið skal verða, at skattatrýstið á hin einstaka verður óbroytt.

KSF hevur gjørt vart við, at bindandi avtalur við kommunurnar ikki er rætta loysnin. Frælsi kommununnar at áseta egið skattaprosent eigur at verða óavmarkað. Tí hevur KSF fyribils skotið upp, at ein avtala verður gjørd partanna millum, har ið ásannað verður, at landið hevur fyri neyðini at hækka skattin til tess at fíggja pensjónsreformin, meðan kommunurnar samstundis fáa rásarúm til at lækka skattin.

Ein annar trupulleiki er, at fíggjarligu avleiðingarnar av pensjónsreforminum ikki eru eins fyri allar kommunur. Summar kommunur fáa ikki yvirskot av reforminum svarandi til 1,25 %, meðan aðrar fáa ríkiliga tað.

KSF og Fíggjarmálaráðið arbeiða í løtuni við at orða eina loysn, soleiðis at báði land og kommunur kunnu taka undir við uppskotinum. Harvið tryggja vit okkum eisini ímóti, at ein møgulig ósemja ímillum land og kommunur um skattabýtið gerst ein forðing fyri, at pensjónsreformurin verður samtyktur.

**Skúlareformurin**

Ætlaði reformurin á fólkaskúlaøkinum bleiv tikin aftur, eftir at millum annað KSF í hoyringsskrivi, dagf. 3. februar 2010, harðliga hevði mótmælt ætlanum Mentamálaráðsins at gera verandi tvíbýti á fólkaskúlaøkinum til eitt tríbýti, har kommunurnar skuldu tvingast inn í skúlasambond ella eitt slag av økisfyrisiting, sum løgfrøðiliga og fyrisitingarliga ikki vóru nóg væl greinað.

Í staðin fyri reformin bleiv annað uppskot um broytingar í fólkaskúlalógini lagt fyri tingið. Uppskotið, sum í løtuni liggur í mentanarnevnd løgtingsins, er munandi minni víðfevnt og snýr seg í høvuðsheitum um at loyva samstarvi um 10. flokk yvir um kommunumørk og loyva stovnsetan av sjálvstøðugum skúlum fyri 10. flokkar.

Ein týðandi broyting er tó, at endaliga avgerðin at leggja skúlar niður nú er latin kommunustýrinum at taka støðu til.

Fyri KSF er hetta enn eitt týðiligt dømi um, hvussu trupult tað er at fremja grundleggjandi og bygnaðarligar broytingar á einum øki, tá ið tveir myndugleikar hava ábyrgdina av tí. Tískil er eingin ivi um, at KSF sum felagskapur eigur at arbeiða fyri, at eisini fólkaskúlin við tíðini verður latin kommununum at umsita.

## Trupulleikar í samskiftinum við landsmyndugleikar

**Hoyringsfreistir**

Hoyringsfreistirnar hava aftur í ár verið ein stórur trupulleiki. Lógaruppskot koma ofta til hoyringar við sera stuttari freist, og er tí ógjørligt hjá KSF at skipa eina veruliga hoyringsmannagongd. Styttri hoyringsfreistin er, verri er tá, at uppskotini ikki eru nóg væl kannað í miðfyrisitingini, soleiðis at tey mangan eru ófullfíggjað. Tá er stórur vandi fyri, at villur ikki verða rættaðar, og kann tað fáa ótilvitaðar avleiðingar, sum eru sera skaðiligar.

KSF fer tí enn einaferð at skjóta upp at fáa í lag regluligar og formligar fundir ímillum landsstýrið og KSF, har greið avtala verður gjørd partanna millum um politisk mál, ætlaðar broytingar, uppskot o.t., ið snúgva seg um kommunala geiran.

**Óneyðugt eftirlit**
Trongdin hjá ymsu ráðstovunum at hava eftirlit við kommununum niður í smálutir er eisini ein tyngjandi trupulleiki hjá kommununum.

Serliga er tað Fíggjarmálaráðið, sum seinastu tíðina hevur havt hug til at fara í smálutir við sínum eftirliti. Ætlan Fíggjarmálaráðsins um at gera neyvar ásetingar viðvíkjandi bruttoskuldini hjá kommununum er eitt gott dømi um uppílegging í innanhýsisviðurskifti hjá kommununum. KSF fanst hvassliga at hesi ætlaðu áseting, og tykist Fíggjarmálaráðið nú at hava slept henni.

Vinnumálaráðið hevur havt ætlanir um at gera felags innkeyps- og útbjóðingarreglur fyri kommunugeiran, sum niður í smálutir skal hava eftirlit við innkeypi og útbjóðing hjá kommununum. KSF tekur ikki undir við hesi ætlan, men mælir heldur til, at vegleiðandi reglur og leiðbeiningar verða gjørdar fyri økið.

KSF metir, at hetta rák fram ímóti detailstýring má steðgast. Tíðin er komin, at vit mugu fara undir eitt yvirskipað orðaskifti um, hvussu vit ætla okkum at skipa hetta samfelagið. Ikki er neyðugt at hava so neyvt eftirlit við kommunugeiranum, sum longu stendur til svars fyri veljaranum fjórða hvørt ár. Her liggur jú tað veruliga fólkaræðisliga eftirlitið.

Sjálvsagt skulu vit hava reglur at ganga eftir, men ikki er neyðugt, at landsmyndugleikin hevur eftirlit við hvørjari avgerð, ið tikin verður av kommunalum myndugleika. KSF sær stóran vanda í hesum ráki, ið kann gerast ein vanlukka fyri samfelagið og fólkaræðið og enda við, at vit kollsigla av berari ovurumsiting.

Landsins uppgáva er at skapa kommununum góðar karmar at virka undir, og landið skal síðan bara hava yvirskipað eftirlit við, at kommunurnar halda seg innan fyri hesar karmar.

## Samstarv

**Samstarv við landið**
Hóast tað kann tykjast, sum at land og kommunur ofta stríðast ímóti hvørjum øðrum, so eru eisini mong dømi um fyrimyndarligt samstarv millum partarnar. Eitt gott dømi er SSP- samstarvið. Beint eftir nýggjár skrivaði Kommunusamskipan Føroya undir nýggjan sáttmála um SSP-samstarv. Sáttmálin skal tryggja, at fyribyrgjandi arbeiðið ímóti kriminaliteti ímillum børn og ung heldur áfram. Lítil ivi er um, at munagott fyribyrgjandi arbeiði fer at síggjast aftur í arbeiðinum hjá kommunalu barnaverndartænastunum.

Somuleiðis skrivaði KSF undir nýggja sáttmálan um Listaleypin í undanfarna ári.

**Millumkommunalt samstarv**
Eisini spurningurin um at leggja kommunufeløgini saman hevur verið fyri í undanfarna ári. Hóast Kommunusamskipan Føroya tekur fult undir við, at allar kommunur í Føroyum eiga at verða skipaðar í eitt kommunufelag, hevur arbeiðið við at leggja kommunufeløgini saman ikki verið raðfest frammarlaga seinasta árið. Beinleiðis atvoldin er óvissan um kommunureformin.

Væntandi fara kommunufeløgini at taka uppaftur samskiftið um hendan spurning, so skjótt sum tað er greitt, hvørja lagnu kommunureformurin fær.

Felagskommunali stovnurin SEV hevur eisini verið umrøddur í felagnum. Hóast KSF sum felagsskapur einki hevur við SEV at gera, so er semja í stýrinum um, at mál viðvíkjandi SEV við fyrimuni kunnu verða umrødd í felagskapinum, fyrst og fremst til at forða fyri ósemjum ímillum kommunur.

**Altjóða samstarv**
Í heyst vóru stýri og starvsbólkur á kunningarferð í Brússel.

Ferðin varð fyrireikað í tættum samstarvi við føroysku umboðsstovuna í Brússel. Endamálið við ferðini var at vitja umboðsstovurnar hjá kommunufeløgunum í grannalondum okkara. Eisini vitjaðu vit belgiska kommunufelagið í Brússel, Býráðið í Brússel, eins og fundur eisini var hildin við stjóran í Council of European Municipalities and Regions, CEMR.

CEMR er størsti felagsskapur í heiminum fyri regionalar og kommunalar myndugleikar. Í felagskapinum eru 58 limir, ið fyrst og fremst eru kommunufeløg og býarfeløg. Teir 58 limirnir umboða fleiri enn 100.000 kommunalar og regionalar myndugleikar.

Endamálið við felagsskapinum er at styrkja lokala fólkaræðið og lokala myndugleikan í londum í Evropa og at arbeiða ímóti tíðarrákinum, sum er, at avgerðarrættur í alsamt størri mun verður tikin frá lokala fólkaræðinum og lagdur hjá stórum miðfyrisitingum, ið ikki geva lokala tørvinum ans.

KSF hevur fyri stuttum sent felagsskapinum umsókn um atlimaskap, og hóast mannagongdirnar í hesum felagsskapi tíverri eru tungar og tíðarkrevjandi, so vænta vit, at umsóknin um atlimaskap verður avgreidd eftir summarsteðgin.

# Framtíðin

**Ætlanir fyri 2011**
KSF hevur sett sær fyri at vitja kommunustýrini í einstøku kommununum komandi mánaðirnar. Endamálið er at kunna um dagliga virksemið hjá KSF og hinvegin at fáa íblástur til at menna og betra tænasturnar hjá KSF mótvegis einstøku limakommununum.

Felagið fær eftir ætlan nýggja heimasíðu um stutta tíð, og skal hon í alt størri mun gerast ein miðil, ið skal betra um samskiftið við limakommunurnar og skapa størri kunnleika til KSF sum felagsskap í almenna rúminum.

Áhugin fyri skeiðvirkseminum hjá KSF er minkaður so mikið, at stuttur steðgur hevur verið í hesum virksemi. Í løtuni fyrireikar skrivstovan skeið, sum eftir ætlan skulu haldast í einstøku kommununum, umframt at farið verður undiraftur vanligu skeiðini innan fyrisitingarrætt, almennt innlit og kommunurætt.

Í løtuni tykist mest sannlíkt, at eldraøkið verður næsta stóra málsøkið, sum verður lagt kommununum at umsita, hóast fleiri kommunur helst høvdu viljað, at fólkaskúlin varð raðfestur fremri.

Undir øllum umstøðum liggur stórt fyrireikandi arbeiði í at greina hesi øki, áðrenn tey verða løgd út, soleiðis at kommunurnar eru tilbúnar at taka ímóti. Serstakliga skal nevnast, at lógarfyrireikandi arbeiðið og fíggjarliga uppgerðin eiga at verða framd á ein fyri kommunurnar nøktandi hátt. KSF fer at leggja stóran dent á hetta fyrireikandi arbeiði, og um neyðugt fer felagsskapurin at leita sær uttanhýsisráðgeving.

Í KSF kundu vit eisini hugsað okkum at sett størri fokus á talgildar borgaratænastur. Í dag gongur nærum alt samskifti millum borgaran og almennu myndugleikarnar fyri seg í pappírsformi. Hetta er tungt og kostnaðarmikið. Grannalond okkara eru komin nógv longri á hesum øki. Tey nýta talgildar undirskriftir, ið merkir, at borgarin kann avgreiða nærum øll síni viðurskifti við myndugleikarnar á alnetinum. Hesa tænastu til borgarans eiga vit sum kommunur í nógv størri mun at menna. Í talgildum skipanum liggja ótømandi møguleikar fyri ódýrum og hollum tænastum, ið gagna borgaranum. Men í einum lítlum samfelag sum okkara eiga vit at kunna finna saman og menna eina felags skipan í sambandi við talgildar undirskriftir, soleiðis at hin einstaki bara nýtir eina talgilda undirskrift í øllum sínum samskifti við almennar stovnar, peningastovnar og onnur.

**At enda**

Góðu felagar. Nú politiska støðan í samfelagnum er ørkymlandi, og vandin fyri tilvildarligum og lítið skynsomum loysnum fyri kommunugeiran er stórur, hevur ein samskipandi kommunalur felagsskapur sum KSF størri týdning enn nakrantíð.

Hóast vit ofta tykjast ósamd, hevur tað at kalla altíð eydnast okkum at finna loysnir innan felagsskapin, og hendan eginleika eiga vit at virðismeta og menna.

Vóru vit samd um øll viðurskifti, so høvdu vit neyvan eitt vælvirkandi fólkaræði. Fólkaræðisligar skipanir leggja dent á semjur, eingin áhugapartur fær allan sín vilja ígjøgnum. Í KSF sýna vit styrki við at finna neyðugu semjurnar, saman standa vit sterkari, og kunnu vit í KSF koma fram til felagsstøður, so er lítil ivi um, at vit koma at skunda undir landsins leiðslu, soleiðis at hon eisini kennir seg noydda at taka støðu í átrokandi málum.

Kommunurnar í KSF vilja verða við til at fremja eina samfelagsliga umskipan, har burðardyggar og virkisførar kommunur umsita øll viðurskifti, sum hava beinleiðis

týdning fyri einstaka borgaran. Kommunurnar skulu verða ein nógv meiri avgerandi partur av fólkastýrinum, har nærleikin millum politikkara og borgara tryggjar betri tænastu, betri umsiting og betri møguleikar fyri virknari borgaraluttøku - og harvið samfelagsligan framburð. Kommunubygnaðurin, eitt greitt uppgávu- og ábyrgdarbýti og kommunala fíggingarskipanin hanga saman og eru fortreytir fyri hvørjum øðrum. Tískil fer KSF undir ongum umstøðum at góðtaka, at ein tilvildarligur meirluti á Føroya Løgtingi fer at leggja kommunurnar saman og síðani skriva út val.

Við hesum boðskapi skal eg enda fyrstu formansfrágreiðing mína og samstundis nýta høvið at takka stýri, starvsbólki og starvsfólki fyri gott samstarv hesar fáu mánaðirnar, eg havi verið forkvinna í KSF. Samstundis ynski eg tykkum ein framhaldandi góðan aðalfund. At enda vil eg bera undangongumanni mínum, Heðini Mortensen, eina tøkk fyri hansara formanstíð. Hann hevur verið KSF ein góður formaður. Vón og ynski mítt sum forkvinna er, at tað góða og dýnamiska samstarvið í stýrinum, sum altíð hevur eyðkent KSF, framhaldandi skal verða okkara styrki sum felagsskapur - til frama fyri kommunala geiran og alt Føroya fólk.

Takk fyri.

Tórshavn, hin 15. apríl 2011

Gunvá við Keldu
Forkvinna
Kommunusamskipan Føroya

## Um Kommunusamskipan Føroya

**Stýrið 2011**
Gunvá við Keldu, forkvinna, borgarstjóri í Klaksvíkar kommunu
Heðin Mortensen, næstformaður , borgarstjóri í Tórshavnar kommunu
Magnus Rasmussen, borgarstjóri í Runavíkar kommunu
Kristin Michelsen, borgarstjóri í Tvøroyrar kommunu
Sigurd S. Simonsen, borgarstjóri í Fuglafjarðar kommunu
Kirstin Strøm Bech, borgarstjóri í Vágs kommunu
Brandur Sandoy, borgarstjóri í Sands kommunu

**Starvsbólkurin**
Jákup Frants Larsen, formaður, býráðsskrivari í Fuglafjarðar kommunu
Ingibjørg Berg, kommunustjóri í Tórshavnar kommunu
John Færø, kommunustjóri í Klaksvíkar kommunu
Dinna Jensen, býráðsskrivari í Runavíkar kommunu
Jónleyg Bech, býráðsskrivari í Tvøroyrar kommunu
Petry Joensen, býráðsskrivari í Vágs kommunu
Marnar Højsted, umsitingarleiðari í Sands kommunu

**Skrivstovan**
Eyðun Christiansen, aðalskrivari. Teldupostir eydun@ksf.fo Tel. 282480
Bárður Larsen, løgfrøðiligur ráðgevi. Teldupostir bardur@ksf.fo Tel. 229089
Armgarð H. Godtfred, skrivari. Teldupostir armgard@ksf.fo

**Skrivstovan**
Heimasíðan www.ksf.fo
Teldupostur ksf@ksf.fo
Telefon 302480
Faks 302481

## Umboð hjá Kommunusamskipan Føroya í nevndum, ráðum v.m.

| | |
|---|---|
| **Kommunala Arbeiðsgevarafelagið** | Heðin Mortensen, Tórshavnar kommuna<br>Kristin Michelsen, Tvøroyrar kommuna<br>Magnus Rasmussen, Runavíkar kommuna (varalimur)<br>Sigurð S. Simonsen, Fuglafjarðar kommuna (varalimur) |
| **Barnaverndarstova Føroya** | Gunvá við Keldu, Klaksvíkar kommuna |
| **Ráðið fyri brekað** | Gunvá við Keldu, Klaksvíkar kommuna<br>Kirstin Strøm Bech, Vágs kommuna (varalimur) |
| **Býarskipanarnevndin** | Eliasar Kastalag, Runavíkar kommuna<br>Rúna Hilduberg, Tórshavnar kommuna (varalimur) |
| **Toll- og skattaráðið** | Ingibjørg Berg, Tórshavnar kommuna<br>John Færø, Klaksvíkar kommuna |
| **Útbúgvingarráðið fyri sløkkiliðsfólk** | Kartni Jacobsen, Tórshavnar kommuna<br>Finn Hansen, Klaksvíkar kommuna (varalimur) |
| **Demokratia** | Ingibjørg Berg, Tórshavnar kommuna<br>Magnus Rasmussen, Runavíkar kommuna (varalimur) |
| **Undirvísingarportalurin** | Kirstin Strøm Bech, Vágs kommuna<br>Dávur Winther, Klaksvíkar kommuna (varalimur) |
| **Listaleypurin** | Eyðun Christiansen, KSF |
| **Talgild Heilsuskipan** | Eyðun Christiansen, KSF |
| **Alarmsentralur 112** | Heðin Mortensen, Tórshavnar kommuna<br>Eyðun Christiansen, KSF |
| **PISA-tilvísingarbólkur** | Eyðun Christiansen, KSF |
| **Fólkateljing** | Bárður Larsen, KSF |
| **SSP-samstarvið** | Gunvá við Keldu, Klaksvíkar kommuna<br>Eyðun Christiansen, KSF |
| **Eftirskúli í Hvalba** | Heðin Mortensen, Tórshavnar kommuna |
| **Oyggjaleikir 2015** | Eyðun Christiansen, KSF<br>Dinna Jensen, Runavíkar kommuna |
| **Skúlastýrið Skúlin á Trøðni** | Hanus Joensen, Tórshavnar kommunuskúli |
| **Upptøkunevnd Skúlin á Trøðni** | Hallbjørg Lamhauge, Barnaverndarstova Føroya |
| **Serflutningsskipan Landsins** | Eyðun Jensen, Tórshavnar kommuna<br>Jancy Klein, Klaksvíkar kommuna |
| **Endurskoðan av dagsstovnalógini** | Eyðun Christiansen, KSF<br>Jóan Petur Hentze, Tórshavnar kommuna |
| **Tilbúgving, stýrisbólkur** | Eyðun Christiansen, KSF |
| **Tilbúgving, arbeiðsbólkur** | Sunleiv Højgaard, Runavíkar kommuna |

## Hoyringar frá landsstýrinum og flokkum

### Uppskot til hoyringar í 2010

| | |
|---|---|
| Almannamálaráðið | Kunngerð um gjøld fyri heimahjálp (januar)<br>Kunngerð um heimahjálp (januar)<br>Um almenna forsorg (mars)<br>Álit, børn og ung (mars)<br>Um áseting og javning av almannaveitingum ( juni)<br>Um almenna forsorg (juli)<br>Um uppihald á stovni o.l. (juli)<br>Um almannapensjónir o.a. (juli)<br>Um viðbót til ávísar pensjónistar v.fl. (juli)<br>Um áseting og javning av almannaveitingum (juli)<br>Um almenna forsorg (septembur)<br>Um bygging av íbúðum í Sandavági til sinnisveik (novembur) |
| Innlendismálaráðið | Um bygging (februar)<br>Kunngerð um bunkring og um flutning av oljulast (mars) |
| Mentamálaráðið | Um meirvirðisgjald (mars)<br>Um heilsuútbúgvingar (septembur)<br>Um útbúgvingarráð fyri heilsuútbúgvingar (septembur)<br>Um málráð (novembur)<br>Um skipan og undirvísing í forskúla (novembur)<br>Námsfrøðilig stevnumið fyri dagstovnar (desembur) |
| Fíggjarmálaráðið | Kunngerð um meirvirðisgjald hjá kommununum v.m. (mai)<br>Um landsskatt og kommunuskatt (juli)<br>Um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn (juli)<br>Um áseting av skatt (juli)<br>Um javning av fólkapensjónum (juli)<br>Um eftirlønaruppsparing og um skatt av eftirlønum (august)<br>Kunngerð um endurrindan av meirvirðisgjaldi til kommunurnar v.m. (oktobur)<br>Kunngerð um meirvirðisgjald hjá serstøkum lutaíbúða-feløgum (oktobur) |
| Vinnumálaráðið | Kunngerð um standard hýruvognsreglugerð (juni)<br>Um løggilding og skráseting av matvøruvirkjum (juli) |
| Fiskimálaráðið | Um tílbúgving (septembur) |

| | |
|---|---|
| Umhvørvisstovan | Kunngerð um ozonoyðandi evni (oktobur)<br>Kunngerð um taðing (desembur) |
| Heilsufrøðiliga Starvsstovan | Stýring av sjógvgóðsku (oktobur) |

**Uppskot til hoyringar higartil í 2011**

| | |
|---|---|
| Vinnumálaráðið | Um jarðhitaskipanir (januar)<br>Um innkeyps og útboðspolitikk (januar)<br>Um arbeiðsloysistrygging og ávísing (februar)<br>Um at banna mismuni á arbeiðsmarknaðinum orsakað av breki (februar) |
| Fiskimálaráðið | Um tilbúgving (januar) |
| Sjálvsstýrisflokkurin | Um lestrarpláss (januar)<br>Um at endurskoða fólkaskúlalógina (januar)<br>Um fólkaskúlan (januar) |
| Fíggjarmálaráðið | Um kommunustýri (januar)<br>Um tinglýsingargjøld (januar)<br>Um manntal (januar) |
| Innlendismálaráðið | Um verju av havumhvørvinum (januar)<br>Um bygging av bygningum o. a. (januar)<br>Um fólksliga tilgongd í samband við ætlaðu kommunalu umskipanina (februar)<br>Um einkarætt til at byggja, reka og fíggja undirsjóartunnil undir Skálafjørð og Tangafjørð (februar) |
| Mentamálaráðið | Um dagstovnar og dagrøkt (februar)<br>Um fólkaskúlan (februar) |
| Umhvørvisstovan | Um adressur (mars) |

## Viðtøkur fyri Kommunusamskipan Føroya

Viðtøkur fyri Kommunusamskipan Føroya – KSF – samtyktar á stovnandi aðalfundi 10. juni 1999 við broytingum á aðalfundi 22. mars 2001, 26. mars 2004, 16. mars 2007 og 24. apríl 2009.

**Navn, limaskapur og endamál**

**§ 1**. Navn felagsins er Kommunusamskipan Føroya. Heimstaður felagsins er Tórshavn.

**§ 2**. Limir felagsins eru hesar kommunur: Tórshavnar kommuna, Klaksvíkar kommuna, Runavíkar kommuna, Fuglafjarðar kommuna, Tvøroyrar kommuna, Vágs kommuna og Sands kommuna.
*Stk. 2*. Aðrar kommunur kunnu gerast limir, um hetta verður góðkent á aðalfundi.

**§ 3**. Endamál felagsins er at virka fyri felags áhugamálum og størri kommunalum sjálvræði.

**Aðalfundurin**

**§ 4**. Aðalfundurin er hægsta vald felagsins.
*Stk. 2*. Hvørt kommunustýri velur eitt umboð til at taka avgerð á aðalfundi. Aðrir kommunustýrislimir hava rætt at møta og taka orðið á aðalfundi.
*Stk. 3*. Boðast skal til aðalfund við 14 daga freist.
*Stk. 4*. Á aðalfundi hevur hvør kommuna eina atkvøðu fyri hvønn íbúgva 1. januar undan aðalfundinum, tó so at eingin kommuna hevur fleiri atkvøður enn 45% av samlaða fólkatalinum hjá limakommununum.
*Stk. 5*. Avgerðir á aðalfundi verða tiknar við vanligum atkvøðumeiriluta, tá ikki annað er tilskilað í hesum viðtøkum.

**§ 5**. Ársaðalfundur verður hildin á hvørjum ári í mars mánað við hesi skrá:
a) Val av fundarstjóra.
b) Frágreiðing um virki felagsins í farna árinum og um framtíðarætlanir felagsins.
c) Framløga av roknskapi til góðkenningar.
d) Val av grannskoðara.
e) Møgulig uppskot frá stýrinum, herundir upptøka av nýggjum limum.
f) Ymist.
*Stk. 2*. Eykaaðalfundur verður hildin, tá ið stýrið heldur tað vera neyðugt, ella tá ið helmingurin av limakommununum skrivliga biðja um tað. Innkalling til eykaaðalfund fer fram á sama hátt og við somu freist, sum til vanligan aðalfund.

**Stýrið**

**§ 6**. Tá talan ikki er um mál, sum skulu viðgerast á aðalfundi, er ovasta leiðsla felagsins eitt stýri við hægst 9 limum, sum er sett saman fyri 4 ár í senn, ið tekur við 1. januar, eftir at kommunustýrisval hevur verið, eftir hesi skipan:

Norðuroyggjar velja ein, eystur Eysturoy velur ein, vestur Eysturoy velur ein, Sundalagið velur ein, Streymoy velur ein, Vágar velja ein, Sandoy velur ein, norður Suðuroy velur ein og suður Suðuroy velur ein.
Formaðurin í størstu kommununi fyri hvørt øki verður tilnevndur stýrislimur.
*Stk 2.* Stýrið skipar seg sjálvt við formanni og næstformanni og eftir somu mannagongd, sum formaður og næstformaður verða valdir í kommunustýrum, tó so, at formaður og næstformaður verða valdir fyri 2 ár í senn.
*Stk. 3.* Stýrisfundur er viðtøkuførur, tá í minsta lagi helmingurin av stýrislimunum eru møttir. Avgerðir verða tiknar við vanligum atkvøðumeiriluta. Miðast skal tó ímóti, at stýrisavgerðir eru einmæltar.
*Stk. 4.* Hvør stýrislimur kann krevja stýrissamtykt lagda fyri aðalfund, áðrenn hon verður sett í verk.
*Stk. 5.* Stýrisfundur skal vera í minsta lagi eina ferð hvønn ársfjórðing. Formaðurin kann kalla stýrið til fundar, tá mál er, sum krevur stýrisavgerð, og sum ikki kann bíða til næsta regluliga fund.

**§ 7**. Fráboðan til stýrisfund skal gevast við 14 daga varningi.

**Starvsbólkurin**

**§ 8**. Í starvsbólkinum sita kommunuskrivararnir/stjórarnir í limakommununum. Stýrið velur formannin.
*Stk. 2.* Starvsbólkurin skal fyrireika mál, sum skulu viðgerast á stýris- og aðalfundi, og hann skal arbeiða við øllum málum, sum stýrið beinir til hansara.
*Stk. 3.* Starvsbólkurin hevur fund eina ferð um mánaðin. Tó skal formaðurin kalla til fundar, hvørja ferð stýrisfundur er lýstur, um so er, at mál, sum skulu viðgerast har, ikki eru liðug fyrireikað.
*Stk. 4.* Starvsbólkalimir skulu møta á starvsbólka- og stýrisfundum.
*Stk. 5.* Stýrisformaðurin skal hava fundarboð til hvønn starvsbólkafund.

**Skrivstovan**

**§ 9**. Stýrið setur og loysir úr starvi aðalskrivara, ið hevur ábyrgdina mótvegis stýrinum fyri, at virksemi felagsins verður rikið sambært galdandi reglum.
*Stk. 2.* Aðalskrivarin hevur dagligu fyrisitingina av felagnum um hendi, og skal í samstarvi við starvsbólkin og stýrið umsita felagið innan fíggjarligu karmarnar og í samsvari við endamál felagsins.
*Stk. 3.* Stýrið ger starvsskipan fyri aðalskrivaran.
*Stk. 4.* Aðalskrivarin kann seta neyðug hjálparfólk eftir ásetingum í starvsskipanini sambært stk. 3.
*Stk. 5.* Starvsbólkurin er dagliga bindiliðið millum aðalskrivaran og limakommunurnar.

**Fíggjarviðurskifti**

**§ 10**. Útreiðslurnar av at reka felagið verða goldnar av limakommununum. Tó kann eingin kommuna rinda meira enn 45% av limagjaldinum.
*Stk. 2.* Stýrisformaðurin ger saman við starvsbólkaformanninum og aðalskrivaranum uppskot um fíggjarætlan fyri felagið komandi fíggjarár, sum hann fyrileggur stýrinum

til góðkenningar í seinasta lagi í apríl ársfjórðingi. Samstundis verður avgjørt, hvussu stórur parturin er hjá hvørjari kommunu.
*Stk. 3.* Áðrenn fíggjarætlan felagsins verður viðgjørd í stýrinum, skal starvsbólkurin hava gjørt sítt tilmæli.
*Stk. 4.* Limakommunurnar rinda í minsta lagi 1/12 part hvønn mánað til felagið.
*Stk. 5.* Eingin limakommuna heftir fyri skyldum felagsins við øðrum enn tí, sum avgjørt er at vera hennara partur av útreiðslunum, sambært fíggjarætlanini.
*Stk. 6.* Ongar avgerðir í málum, sum krevja kommunustýrissamtykt, eru bindandi fyri limakommunurnar, uttan tílík samtykt fyriliggur.

**Roknskapur**

**§ 11**. Aðalskrivarin hevur ábyrgd av roknskaparførsluni.
*Stk. 2.* Roknskapurin verður grannskoðaður av løggildum ella skrásettum grannskoðara.

**Aðrar ásetingar**

**§ 12**. Felagið verður teknað av stýrisformanninum og starvsbólkaformanninum ella aðalskrivaranum í felag, ella av tveimum stýrislimum saman við starvsbólkaformanninum ella aðalskrivaranum.

**§ 13**. Samtyktir um broytingar av viðtøkunum ella avtøku av felagnum skulu gerast av aðalfundinum. Í minsta lagið ¾ av atkvøðutalinum skulu vera umboðað, og uppskotið skal samtykkjast við 3/5 av greiddum atkvøðum.
*Stk. 2.* Er fundurin ikki viðtøkuførur, verður nýggjur fundur 14 dagar seinni, og er hesin viðtøkuførur uttan mun til, hvussu nógvar atkvøður eru umboðaðar. Samtykt skal tó vera við 3/5 av greiddum atkvøðum.

**§ 14**. Verður felagið tikið av, falla ognirnar aftur til limakommunurnar í sama lutfalli, sum tær hava luttikið í útreiðslum felagsins.

Broytingar av viðtøkunum eru samtyktar á aðalfundi tann 22. mars 2001, 26. mars 2004, 16. mars 2007 og 24. apríl 2009.

Stýrið 24. apríl 2009

| | |
|---|---|
| Heðin Mortensen, formaður<br>Tórshavnar kommuna | Gunvá við Keldu, næstformaður<br>Klaksvíkar kommuna |
| Magnus Rasmussen<br>Runavíkar kommuna | Kristin Michelsen<br>Tvøroyrar kommuna |

Sigurð S. Simonsen
Fuglafjarðar kommuna

Kirstin Strøm Bech
Vágs kommuna

Páll á Reynatúgvu
Sands kommuna